## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin~ Kristi Himmalsferðardag:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og regn eitt skifti. Seinnapartin minkar hann vindin av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Sunnudagin minkar hann vindin av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Flaggdagshald í London

**Av tí at flaggdagurin fall á ein fríggjadag, hevur føroyska sendistovan í London valt at halda flaggdagshaldið í dag. Orsøkin er, at so nógv fólk fer úr býnum um vikuskiftið**

ÚTISETAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Sigmundur Isfeldt inni á skrivstovu síni við føroysku fløggunum framman fyri sær*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var sjálvan flaggdagin, at vit av tilvild rendu okkum beint í føroysku sendistovuna í London, og vit hildu okkum verða tvífalt hepnir, tí vit væntaðu harvið at fáa flaggdagshaldið, sum sendistovan skipar fyri á hvørjum ári, við. Men so var ikki.

- Hetta er London, og tí mugu vit laga okkum eftir. Her er tað soleiðis, at hópurin av fólki, politikarar og handilsmenn og annað fólk, býr uttan fyri London, og fríggjadag fara hesi fólk til hús í vikuskiftisfrí, sigur Sigmundur Isfeldt, føroyskur sendimaður í London.

Hetta merkir, at omanfyri nevndu fólk ikki hava møguleika at koma til flaggdagshaldið hjá føroysku sendistovuni fríggjadag.

- Tí hava vit valt at flyta flaggdagshaldið til týsdagin 29. apríl, tá vit fáa meiri burturúr móttøkuni, sigur Sigmundur Isfeldt.

Høgni Hoydal verður við til flaggdagshaldið. Hann fór til London sunnudagin, og meðan hann er staddur har skal hann út á Isle of Man at hava fundir, og eisini gongur leiðin til Aberdeen, har aðrir fundir skulu haldast. So føroyski sendimaðurin í London fær úr at gera hesa vikuna saman við uttanríkisráðharranum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 19 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 11 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 33 |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. skamt eystan fyri Føroyar fer spakuliga vestureftir og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Onglandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/4 kl. 06⁰⁰ – 21/4 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/4 kl. 06⁰⁰ – 21/4 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 33 mm




Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 23.apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 28.apríl | Seinna kvarter |
| 5.mai | Tendring |
| 6.mai | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29.apríl | 2:19 | 14:54 | 1:19 | 13:54 | 1:34 | 14:09 | 4:19 | 16:54 | 5:19 | 17:54 | 0:34 | 13:09 | - | 12:09 | 2:34 | 15:09 | 3:34 | 16:09 | 2:04 | 14:39 | 3:19 | 15:54 |
| 30.apríl | 3:14 | 15:34 | 2:14 | 14:34 | 2:29 | 14:49 | 5:14 | 17:34 | 6:14 | 18:34 | 1:29 | 13:49 | 0:29 | 12:49 | 3:29 | 15:49 | 4:29 | 16:49 | 2:59 | 15:19 | 4:14 | 16:34 |
| 1. mai | 3:54 | 16:14 | 2:54 | 15:14 | 3:09 | 15:29 | 5:54 | 18:14 | 6:54 | 19:14 | 2:09 | 14:29 | 1:09 | 13:29 | 4:09 | 16:29 | 5:09 | 17:29 | 3:39 | 15:59 | 4:54 | 17:14 |
| 2. mai | 4:34 | 16:55 | 3:34 | 15:55 | 3:49 | 16:10 | 6:34 | 18:55 | 7:34 | 19:55 | 2:49 | 15:10 | 1:49 | 14:10 | 4:49 | 17:10 | 5:49 | 18:10 | 4:19 | 16:40 | 5:34 | 17:55 |
| 3. mai | 5:17 | 17:39 | 4:17 | 16:39 | 4:32 | 16:54 | 7:17 | 19:39 | 8:17 | 20:39 | 3:32 | 15:54 | 2:32 | 14:54 | 5:32 | 17:54 | 6:32 | 18:54 | 5:02 | 17:24 | 6:17 | 18:39 |